## UTTAN ÚR HEIMI

# Hermenn pína og drepa

**Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch vil vera við, at amerikonsku hermenninir í Afghanistan pína og drepa fangar**

MANNARÆTTINDI

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í einari nýggjari frágreiðing vil Human Rights Watch, sum hevur høvuðsstøð í New York, vera við, at amerikanskir hermenn í Afghanistan hava gjørt seg sekar í álvarssomum brotum á mannarættindini.

– Vit hava álítandi prógv fyri, at amerikanskir hermenn eru sekir í píning ella øðrum ómenniskjaligum ágangi ímóti fangum, stendur millum annað í frágreiðingini. Eisini verður sagt, at amerikonsku hermenninir taka tilvildarligar afghanar, sum verða illa viðfarnir, og at hermenninir ræna alt frá fangunum.

Human Rights Watch heldur tað vera serliga atfinningarsamt, at fleiri av hesum tilburðunum hava einki havt við kríggj ella onnur hernaðarlig tiltøk at gera. Sambært felagsskapinum hava minst fýra afghanar latið lív, meðan teir hava sitið í varðhaldi hjá amerikanska herinum, og herurin hevur sýtt fyri at greiða frá, hvat hendi fangunum.

– USA hevur bundið seg til at kanna ákærur sum hesar og at revsa teir, sum bróta lógina, men tað er einki, sum bendir á, at nakað av hesum málum verður kannað, segði Brad Adams hjá Human Rights Watch, tá hann almannakunngjørdi ta nýggju frágreiðingina.

Amerikanska herleiðslan í Afghanistan hevur sýtt stýri at siga, hvussu nógvar fangar herurin hevur, men Human Rights Watch sigur, at talan er um minst 1.000 fólk, sum eru tikin sum liður í jagstranini eftir limum í Taliban og al-Qaeda. Teir flestu fangarnir eru í legum á amerikonsku herstøðunum í Bagram, Kandahar, Jalalabad og Asadabad. Umstøðurnar í fangalegunum eru sera vánaligar, og fangarnir sleppa ikki at tosa við nakran uttan fyri legurnar, sigur Human Rights Watch.

Ein talsmaður hjá amerikonsku herleiðsluni í Afghanistan avsannar tað, sum stendur í frágreiðingini. Hann sigur við Reuters, at skuldsetingarnar hjá Human Rights Watch vísa, at felagsskapurin skilir ikki støðuna.

– Afghanistan er eitt krígsøki, og hermenn okkara berjast ímóti fíggindum. Vit halda allar reglur og lógir, sum eru galdandi í sambandi við vápnað stríð, sigur Bryan Hilferty, oberstur.

# Tátta takið um bin Laden

**Vápnaðir ættarbólkar fara nú at hjálpa amerikonsku og pakistansku hermonnunum at finna Osama bin Laden og næstu menn hansara. Men summar keldur vilja vera við, at bin Laden er flýddur og kann kenna seg tryggan**

YVIRGANGUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Meðan ómannað amerikonsk njósnaraflogfør og fylgisveinar halda eygað við øllum, sum fyriferst í fjøllunum á markinum ímillum Pakistan og Afghanistan, skulu lokalir krígsmenn kanna holur og annars øll støð, ið kunnu hugsast at fjala leiðaran í al-Qaeda, Osama bin Laden, og næstu menn hansara.

Pakistan hevur sent einar 70.000 hermenn til fjallalendið har vesturi í landinum, har teir skulu leita eftir limum í Taliban og al-Qaeda. Amerikanskir hermenn eru eisini har, og tann serliga 121. herdeildin, sum fann Saddam Hussein, skal nú eisini sendast til Pakistan at leita eftir bin Laden.

Um vikuskiftið hittust eini 500 umboð fyri ymsar ættarbólkar har vesturi í Pakistan. Evnið á fundinum var ein áheitan um at hjálpa amerikanarum og pakistanum at finna leiðaran í al-Qaeda og hansara næstu menn, og menn samdust um at manna ein her við 1.200 monnum, sum skulu niðan í fjøllini at leita. Teir Taliban- ella al-Qaeda-limir, sum verða funnir, skulu latast myndugleikunum.

Síðani bretsku hjálandatíðina hava ættarbólkarnir har vesturi í Pakistan havt eitt ávíst sjálvsstýri og egna lóggávu. Vanliga hava teir fingið frið fyri teimum pakistonsku myndugleikunum, og teir hava ferð eftir ferð sett seg upp ímóti pakistanska herinum, Men nú Pakistan hevur sent 70.000 hermenn til økið, hava ættarbólkarnir einki í at velja enn at stuðla herinum, skrivar Reuters. Vón teirra er so, at hermenninir verða tiknir aftur, tá bin Laden og hansara menn eru funnir. Hetta er ikki fyrstu ferð, at teir lokalu ættarbólkarnir hava lovað at hjálpa pakistanum og amerikanarum, men hesaferð er tað álvara.

### Nær við

Amerikanskar keldur vilja vera við, at pakistanskir hermenn mundu fingið fatur á bin Laden fyri trimum vikum síðani, men at hann slapp undan teimum. Fregnartænastukeldur í USA hava eisini sagt, at eitt ómannað amerikanskt njósnaraflogfar skal hava tikið myndir av einum manni, og at tað helst var varaleiðarin í al-Qaeda, egyptin Ayman al-Zawahiri, sum eisini gongur undir heitinum Deyðans lækni.

Bretska blaðið Sunday Telegraph skrivar, at sonur al-Zawahiri, Khalid, varð tikin saman við tjúgu øðrum monnum í útsynningspartinum av Pakistan fyri hálvari aðru viku síðani, og at hann skal hava givið amerikanarum týðandi upplýsingar.

Aðrar amerikanskar og pakistanskar keldur vilja vera við, at Osama bin Laden og menn hansara eru als ikki í fjøllunum longur. Teir eru farnir haðani og kunnu kenna seg tryggar nú, siga hesar keldurnar sambært Sunday Telegraph.

# Hann fær úr at gera

**Konservativi leiðarin í Grikkalandi, Kostas Karmanlis, tekur nú við stjórnarvaldinum, men hann fær úr at gera, tí trupulleikarnir eru nógvir**

GRIKKALAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Kostas Karmanlis aftan á valsigurin sunnukvøldið. Sum forsætisráðharri fær hann úr at gera*
*Mynd: Reuters*

Demokratiski flokkurin hjá Kostas Karmanlis fekk 45,5 prosent av atkvøðunum á tjóðartingsvalinum sunnudagin, og tað gav flokkinum 165 av teimum 300 tingsessunum. Demokratiski flokkurin kann sostatt skipa stjórn einsamallur, og fyri fyrstu ferð í ellivu ár noyðast sosialistarnir at lata valdið frá sær.

Kostas Karmanlis er 48 ára gamal og tann yngsti grikski forsætisráðharrin nakrantíð. Hann hevur amerikanska løgfrøðiútbúgving og sigst vera væl fyrireikaður til ta nýggju uppgávuna.

Men hann fær eisini úr at gera. Arbeiðsloysið í Grikkalandi er næstan tíggju prosent, og inflasjónin hevur verið støðugt veksandi, síðani landið fekk sær evruna til gjaldoyra.

Ein annar trupulleiki er, at Athen er vertur fyri teimum olympisku leikunum í summar, men enn eru fyrireikingarnar ikki komnar meiri enn í helvt. Men eisini ta uppgávuna ætlar Kostas Karmanlis sær at loysa.

– Vit fara at gera okkara besta til, at teir olympisku leikirnir verða teir bestu og tryggastu, sum verið hava. Leikirnir eru ein góður møguleiki hjá Grikkalandi at vísa, at landið er eitt nútímans samfelag, segði Karmanlis sunnukvøldið.



Várframsýningin 2004:

# Ungt forvitni



*Tey 20 listafólkini og umleið 100 listaverkini, ið eru sloppin við, eru so eitt boð uppá eitt ógvuliga fjølbroytt svar. Men tað er serliga tað yngra ættarliðið, ið løðir huglagið í Listaskálanum hesar dagarnar við síni listarligu leitan og forvitnisliga fjølbroytni.*

**Ungt listarligt forvitni ger tað høgt til loft og vítt til veggja á Várframsýningini í ár**

*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*

"Gávur eru ymiskar, onkur hevur eina serliga æðr og ein kann hava meir at oysa av enn annar. Men einans áhaldandi tógvið stríð við form, lit, striku - ella orð, ljóð, ljós og rørslu - kann geva vónir um at náa so langt, at talast kann um list." Soleiðis hugleiðir Bárður Jákupson í tekstinum til framsýningarskránna, har hann roynir at varpa ljós á onki minni enn spurningin "Hvat er list?"

### Listarlig leitan

Tey 20 listafólkini og umleið 100 listaverkini, ið eru sloppin við, eru so eitt boð uppá eitt ógvuliga fjølbroytt svar. Men tað er serliga tað yngra ættarliðið, ið løðir huglagið í Listaskálanum hesar dagarnar við síni listarligu leitan og forvitnisliga fjølbroytni.

Fríða Brekku er ein av teimum, ið er við fyri fyrstu ferð. Skeivu skeringarnar flyta eitt annars vanligt fokus frá myndevninum og lata upp fyri eini óendaligari variatión av teimum trimum naturalistisku vatnlitsmyndunum av seyði og seyðaull. Myndirnar hjá Fríðu eru smáar og høvdu ivaleyst komið betri til sín rætt onkra aðrastaðni. Men tá tú fyrst hevur varnast tær, eru hetta ikki myndir, tú sleppur alt fyri eitt.

Á næsta horni hevur enn eitt nýtt navn fingið pláss, og Andy Warhollíknandi poppartstílurin hjá Andreu Falkvard smæðist ikki burtur - hvørki í stødd ella úttrykki. Harðligu strikurnar og skríggjandi litirnir mana fram tvey andlit undir heitunum "Vøka" og "Longsul" við einum friðloysi, sum nærum etur seg inn í teg.

Tey 7 listaverkini hjá Jens D. Frederiksen fevna víða í tíð og stað. Frá variasjónum yvir keltisku trúnna og fjøruna til hugtakið "Snail Mail", avmyndað sum gomul frímerki, klistrað inn í eina rammu. "Ymiskt tilfar" stendur at lesa í skránni, tí talan er mest um kollagur av rekaviði, gomlum rustaðum jarni savnað í einum djúpum bláum liti, sum gevur tær eina kenslu av tíðar- og staðarligum endaloysi.

### "Áhaldandi tógvið stríð"

Eitt av krøvunum fyri at vera við á Várframsýningin var, at listfólkini lótu inn fleiri verk. Hetta fyri at dómsnevndin betri kundi meta, um talan var um veruligar listarligar gávur og ikki bara eitt tilvildarligt "heppið" avrik. At eitt áhaldandi tógvið stríð liggur aftanfyri prógva øll listaverkini, sum hanga í listaskálanum hesar dagarnar. Men onkursvegna tykist tað sum, hetta stríðið er mest skipað hjá ungu listakvinnuni Ása Rannvá Svennson. Her er tað sjálv skapanargongdin, ið hugtekur mest í eini áhaldandi røð av royndum við litum og strikum. Uttan at taka nakað frá nøkrum av hinum, havi eg varhugan av, hesar 8 myndirnar hjá Ásu bert umboða ein brotpart av tí listarliga hugflogi og tekniska neyvleika, ið tær eru úrslit av.

### Skeivt høvi

Áðrenn Várframsýningin lat upp seinasta fríggjadag vóru røddir frammi um, at framsýningin tóktist at hava mist sítt endamál úr eygsjón. Dómsnevndin hevði nevniliga umhugsað at slept framsýningini heilt ella broyta hana onkursvegna, tí yrkislistafólk ikki høvdu sýnt henni nóg stóran áhuga.

Um tiltakið ikki virkar eftir ætlan, er sjálvandi altíð vert at umhugsa broytingar. Men dagarnir, beint áðrenn framsýningin lat upp, var neyvan best valda høvið at lufta hesar tankar alment. Tú fekk varhugan av, at Várframsýningin í ár í besta føri var næstbesta loysn ella at hesi listafólkini bert vóru við, tí ov lítið var at velja ímillum. Slíkt stimbrar ongan - hvørki komandi listafólk ella tey vitjandi. Og tað er spell, tí uttan mun til um tú hevur skil fyri list ella ikki gevur Várframsýningin í ár ein greiða ábending um, at ung føroysk listafólk onki missa við ikki at verða samanborin við listarliga siðvenju. Kanska tvørturímóti.

# Livað lív í Leikalund

**– Íblásturin fái eg frá menniskjum rundan um meg og teirra lívssøgum. Eg havi nokk altíð verið meir hugtikin av teimum innaru landsløgunum, enn teimum sjónligu, sigur Sigrun G. Niclasen, sum hendan mánaðin hevur framsýning í Leikalund í Klaksvík**

LISTAFRAMSÝNING

*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*



*Sigrun G. Niclasen við málinginum »Omma«. Gamla konan gonur aftur í fleiri av málningunum við sínum ymisku søgum frá einum livaðum lívi*

Tað livaða lívið gongur aftur sum felags tema í flestu málningunum. Serliga er tað gamla konan við teimum ovurstóru hondunum, sum spøkir aftur í hugaheiminum hjá listakvinnuni. Og tað eru eisini hesir málningarnir, sum fangað eyga. Fyrst tí litir og stødd fylla rúmið, teir hanga í, og síðani tá tú varnast nakrar smálutir, sum bróta beinu strikurnar og friðin á myndunum.

### At velja

Ein lívssøga er jú altíð úrslitið av teimum valum, eitt menniskja hevur gjørt, sigur Sigrun. Men tað, sum kanska serliga hugtekur meg, er spurningurin um, hvat tað er, sum fær okkum til at velja til ella frá.

Innihaldsliga verður friðurin á myndunum av gomlu konuni órógvaður av eini hurð, einum lykli og einum spurvi. Valið ímillum at lata upp ella aftur fyri lívinum og nýggjum møguleikum ger tigandi konuna livandi og veruliga. Tað, sum fyrst tóktist at vera ein niðurstøða, verður knappliga ein ella fleiri spurningar um, hvussu vit velja at liva okkara lív.

### Hendur

Hendur hugtaka Sigrun. Her bera tær boð um livað lív, men í teimum liggur eisini møguleikin fyri at gera seg til harra yvir øðrum lívi. Týdningurin av stóru hondini, ið lættliga kundi kroyst evarska lítla spurvin, gongur aftur í eini ovurstórari hønu, ið liggur omaná sínum unga. Hetta er eisini evnið á myndarøðini, Sigrun hevur við á Várframsýningini í ár, men har er boðskapurin týðiligari. Heiti sum »Lívsins byrjan« og »12 vikur« sipa í so beinleiðis til fosturtøkumøguleikan, ið ikki varð valdur, tá røðin endar »Í Guds hondum.«

### Niðurstøður

Tann átrúnaðarliga ávirkanin letur seg ikki fjala í myndunum hjá Sigrun. »Hin góði hirðin«, »Móðurkærleiki« ella »Kærleiki brýtur mørk« eru ein játtan av lívinum og svar uppá teir spurningar, aðrir málningar seta. Men boðskapurin tekur yvir og byrjar at taka avgerðir fyri áskoðaran. Og tað er spell, tí hvør sær standa málningarnir sum sterkar avbjóðingar - bæði í stíli og myndevni.

### Brýtur mørk

Sjálvt um ein partur av framsýningini soleiðis tykist at gera sær sínar egnu avmarkandi niðurstøður, hómast allatíðina royndir at bróta mørk. Stílurin er ógvusliga grafiskur, í løtum mest sum naivistiskur, har skuggar og perspektiv víkja fyri neyvum endurgevingum av smálutum, beinum linjum og klárum litum. Myndaevnini eru tikin úr sínum vanliga høpi og stoyta saman við sínar mótsetningar í nýggjum hugkveikjandi týdningum. Ikki, at hesin stílur brýtur mørk í sær sjálvum, men mátin hann manar fram tað fjøltáttaða í tí einfalda, er serliga forvitnisligur í myndunum av tí gomlu konuni. Eftir framsýningina fara júst hesir málningarnir víðari til Týskland, men fram til 4. apríl eru teir at síggja í hugnaligu, gomlu handilshúsunum úti í Klaksvíkini.